# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bjørn Kalsø 40 ár



Í dag, hósdagin 23. mars, verður Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, 40 ár. Bjørn er ættaður av Syðradali á Kalsoynni, har hann var bygdarráðsformaður, inntil hann gjørdist landsstýrismaður.

Foreldrini hjá Bjørn vóru Sólmay og Stefan Kalsø. Sólmay, fødd í 1928, var ættað úr Søldarfirði. Foreldrini hjá henni vóru Constance fødd Isaksen og Georg Lund Olsen. Hann var søldfirðingur. Hon var fødd á Viðareiði – dóttur Margrethu og Jacob Hendrik Isaksen. Jacob Hendrik misti konuna í 1920. Í 1924 giftist hann uppaftur við Súsonnu Olsen, og árið eftir flutti hann til Søldarfirðar at búgva. Tá var Constance fimtan ára gomul.

Georg fórst við Immanuel í 1932. Constance lærdi síðani til ljósmóður. Hon giftist Óla Joensen, sum var bóndi á Dunganum á Syðradali. Í seinni giftuni var einki barn. Óli datt oman á fjalli í Húsalíð í 1947.

Sólmay giftist í 1950 við Stefan Kalsø av Húsum, sum festi á Dunganum á Syðradali. Pápi Stefan, Dánial í Køkinum, var ættaður av Heyggi á Húsum. Kona hansara, Christianna, var ættað av Dunganum á Syðradali ella úr sama staði, sum sonur hennara seinni fekk festi við konu síni. Henda Christianna var eisini útbúgvin ljóðsmaður. Tað vil altso siga, at báðar ommurnar hjá Bjørn vóru ljósmøður.

Sólmay giftist í 1950 við Stefan Kalsø av Húsum, sum festi á Syðradali. Sólmay og Stefan fingu fýra børn: Gloria (1952), Óli (1954), Dánial (1962) og Bjørn (1966). Gloria býr í Havnini, og dreingirnir búgva allir í Klaksvík.

Bjørn misti mammuna í 1973, tá ið hann var seks ára gamalur, og pápin doyði í november 1982.

Bjørn er skilamaður. Hann hevur altíð havt góðan hug at fáast við seyð, og hann var ikki meiri enn stórur smádrongur, tá ið hann hevði so gott innlit í viðurskifti og umstøður í bø og haga, at tað varð lurtað væl eftir honum. Frá tí at hann var 16 ára gamalur, hevur Bjørn røkt festi á Dunganum.

Bjørn gekk frá 4. flokki í fólkaskúla í Klaksvík. Hann tók studentsprógv í Hoydølum í 1986, og so lærdi hann til húsasmið hjá Josephsen monnunum í Klaksvík. Eitt skifti arbeiddi hann á Kalsoynni, og so smíðani hann saman við Kristiani Jacobsen og Eli Hansen í Klaksvík.

Í 1999 leyk Bjørn lærarаprógv á Føroya Læraraskúla, og síðani hevur hann verið avhildin lærari í skúlanum við Ósánna.

Bjørn giftist í 1990 við Hennibeth fødd Olsen og ættað úr Klaksvík. Foreldrini hjá henni eru Maria og Sørmund Olsen. Tað er henda Maria, sum hoyrist í Útvarpinum, har hon roynir at fáa roykjarar at taka seg saman at leggja av. Hennibeth verður 40 á summarmála, og hon hevur í mong ár arbeitt á skrivstovuni hjá Føroya Bjór.

Hennibeth og Bjørn búgva niðan Horn ella í nýggju búsetingini omanfyri gamla býlingin á Uppsølum. Tey eiga tríggjar dreingir. Steffan (1987), Sørmundur (1992) og Símun (2003).

Í frítíðini fekst Bjørn sum aðrir unglingar í Klaksvík nógv við ítrótt. Hann spældi hondbólt um vetrarnar og fótbólt um sumrarnar, tá ið hann eisini royndi seg í kappróðri. Flogbólturin var tann ítróttin, sum Bjørn gjørdi mest við. Hann var í fleiri ár á góða liðnum hjá Mjølni.

Rættuliga nógv hevur Bjørn verið og er hann á Syðradali, har hann er millum teirra, sum royna at halda 190 ára gomlu bygdini uppi. Á nýggjárinum í 1997 gjørdist Bjørn limur í bygdarráðnum í Húsa kommunu, sum fevnir um Húsar og Syðradal. Hann gjørdist beinanvegin bygdarráðsformaður, og tað var hann inntil tað 24. februar í 2004 vóru boð eftir honum at gerast landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Bjørn er ikki gamalur í landspolitikki. Hann var á listanum hjá Sambandsflokkinum í Norðoya valdømi á løgtingsvalinum 20. januar 2004. Har fekk hann flestar atkvøður, og tað var eftir áheitan frá norðoyingum, at Sambandsflokkurin gjørdi av, at maðurin, sum sambandsfólk í Norðoyggjum vóna skal vinna valdøminum sambandsumboðan á næsta løgtingsvali, gjørdist landsstýrismaður.

Føðingardagin er Bjørn burturstaddur.

**J**

---

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Marjun á Krákusteini, Argir**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 17.30 í Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum. Jarðarferðin verður í morgin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Marjun, kunnu lata Missiónshúsinum á Argjum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

**Joan Højsted, fødd Nielsen, av Eiði**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 22. mars, 53 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Vitalis Elias Vitalis, Klaksvík**, vanliga nevndur Talis í Krotugrøvuni, andaðist í heiminum mikudagin 22. mars, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Christians Kirkjuni leygardagin 25. mars, kl. 13.30.

**Lisabeth Svensson, fødd Hentze**, fyrrverandi ljósmóðir, ættað av Sandi, andaðist í Keypmannahavn 22. mars, 95 ára gomul. Jarðarferðin verður mánadagin 27. mars kl. 11.00 úr Grøndalslund kirkju, Tårnvej, Rødovre.

---

**Dagurin í morgin**

**24. mars. Ulrika**. Teir vita ikki, hvønn hetta halginavnið sipar til. Týska navnið Ulrikus kemur av uodal, ið er sama orð sum óðal, rikus merkir eyður.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
í stóru sorg okkara, tá høgt elskaði maður mín,
okkara kæri pápi, abbi og verpápi

**Svenning Holm Lindenskov**
Nólsoy

so brádliga bleiv heimkallaður til Harran.

Tøkk til Bergur Jacobsen, prest fyri góð orð
í kapellinum á Ríkissjúkrahúsinum,
Leif Hansen fyri orgulspæl og til tykkum,
ið vóru til staðar har.
Takk til tykkum í Vanløse fyri góða hjálp.
Tøkk til Sonju Klein, prest og Rodmund í Liða
fyri troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og tykkum,
ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk til tykkum báðar, sum tóku so væl ímóti okkum,
tá vit komu heim til Nólsoyar aftur.
Øllum tykkum, sum ringdu og vitjaðu í heim okkara,
fyri alla hjálp frá bygdafólkinum og avbygdafólkinum,
fyri blómur og kransar og til hvønn einstakan
av tykkum í tí stóru mannfjøld, ið fylgdu honum
á hansara seinastu ferð her á fold, vilja vit veita
eina hjartans tøkk.

Má Harrin signa tykkum øll.

**Bernhild,**
**Heinina, Elisabeth og Sólbjørg við familjum**

---

**Marjun á Krákusteini**

*Fødd Lamhauge*
ættað úr Rituvík, búsitandi á Argjum

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin 21. mars, 57 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin
23. mars klokkan 17.30 í Kirkju- og Missiónshúsið á
Argjum.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 24. mars kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Niels Eli**

Tey, ið vilja minnast Marjun, kunnu lata Missiónshúsinum á
Argjum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu tá góða
mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Petra Næss Joensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til heimahjálpir og heimasjúkrasystrar.
Tøkk til Sonju Klein, prest, kirkjutænarar og sangarar.
Og tøkk til tykkum, ið á annan hátt hjálptu
í sambandi við jarðarferðina.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum øll,
ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eivind, Gunvør, Dukki og Hanna**